## Blíðir norðmenn

Norska stjórnin hevur gjørt av at játta ikki minni enn eina milliard amerikanskar dollarar hetta til 20015 til at verja frumskógin í Brasil. Tær fyrstu 100 milliónirnar verða latnar í ár og 600 milliónir næsta ár. Peningurin fer í ein serligan frumskógargrunn, og norska tilsøgnin bleiv almannakunngjørd í brasilska høvuðsstaðnum Brasilia í gjár, har norski forsætisráðharrin, Jens Stoltenberg, er á vitjan. Hann og brasilski forsetin, Lula, skrivaðu síðani undir eina samstarvsavtalu um at verja brasilska frumskógin.



## Grønland nýggja flogrutu

Næsta ár fer flogfelagið Air Iceland undir rutuflúgving ímillum Keflavík og Ilulissat. Sum er flýgur Air Iceland ímillum Kelfavík og Nuuk, og ætlanin er at økja ta flúgvingina við einari ferð afturat um vikuna næsta ár, soleiðis at næsta summar verða ferðirnar fýra um vikuna. Silverio Scivoli, sum hevur arbeitt við ferðavinnuni í Ilulissat tey seinastu 15 árini, sigur við kringvarpið KNR, at tann nýggja farleiðin úr Keflavík fer at koma ferðavinnu í Ilulissat væl við.



*Eftir at CHE samgongan er farin í søguna, hava bæði Jóannes Ejdesgaard og Høgni Hoydal alment verið í fjølmiðlunum og úttalað seg neiliga um embætisfólkini í Tinganesi*

# Politikkarar hongja embætisfólk út

**Meðan orrustan um eina skrivstovu í Tinganesi, samgongu-slit og víðari fylgjur fara fram. Er ein bólkur, sum gongur mestsum uttan verju. Talan er um embætisfólkini, har Jóannes Ejdesgaard fyrst ger Petur Petersen til ein trupulleika. Síðani tekur Høgni Hoydal tráðin upp og sáar iva um skriv hjá Marjuni Hanusardóttir og Kristionnu Sjóvará**

POLITIKKUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Eftir, at so stór illstøða hevur tikið seg upp millum Høgna Hoydal og Jóannes Ejdesgaard, at Jóannes Ejdesgaard valdi at siga politiska samstarvið við Tjóðveldi upp, hava báðir verið frammi í miðlunum og alment lagt embætisfólk fram sum trupulleikar og at finna uppá hendingar í Tinganesi.

Fyrst var løgmaður í eini kjaksending hjá sjónvarpinum hjá Kringvarpinum mánadagin, har hann millum annað segði, at Petur Petersen, fyrrverandi aðalstjóri í Mentamálaráðnum, var fluttur oman á løgmansskrivstovuna, tí hann var ein starvsfólkatrupulleiki í Mentamálaráðnum, sum løgmaður orðaði tað í kjaksendingini mánakvøldið.

Í gjár kom næsta málið av líknandi slag, tá Høgni Hoydal í tíðindasending hjá Kringvarpinum sáar iva um ymisk skriv, ið eru komin fram í skrivstovumálinum. Hesi skriv koma beinleiðis frá embætisfólkum í Tinganesi. Embætisfólkini eru um Marjun Hanusardóttir og Kristianna Sjóvará.

### Undir alt lágmark

Sosialurin ringdi í morgun til Meinhard Gaardlykke, formann í Tænastumannafelagnum, og spurdi hann um hendingina, tá løgmaður mánadagin nevndi Petur Petersen í sending hjá Kringvarpinum.

- Eg legði merki til úttalilsi og helt tað vera undir alt lágmark. Petur Petersen er í veruleikanum als ikki partur av kjakinum. Hann er ikki til staðar, og hevur í veruleikanum onki við kjakið at gera. Tí er tað alt ov grovt, at løgmaður fyri opnum skermi úttalar seg um eitt persónsmál, sigur formaðurin í tænastumannafelagnum.

Hinvegin greiðir Meinhard Gaardlykke frá, at Petur Petersen ikki hevur vent sær til felagið, men roknar við, at Petur Petersen fer at venda sær til felagið.

Petur Petersen er tó í einari heldur løgnari støðu, tí samstundis sum løgmaður kallar Petur Petersen fyri ein starvsfólkatrupulleika í Mentamálaráðnum, hevur Petur Petersen verið serligur ráðgevi hjá løgmanni síðan 18. juli í ár. Tað vil siga, at í dag er løgmaður stjóri hjá Peturi Petersen, og tí kann tað vera torført hjá Peturi Petersen at venda sær til Tænastumannafelagið, men vendir hann sær til felagið, fær felagið illa gjørt nakað við málið.

- Um Petur Petersen vendir sær til okkara um hetta mál, kunnu vit ikki gera annað enn at geva eina átalu, men fær Petur Petersen í framtíðini trupulleikar við starvinum, setir Tænastumannafelagið sjálvandi inn, sigur Meinhard Gaardlykke.

### Taka málið upp

Petur Petersen er tó ikki tann einasti, sum er vorðin partur av kjakinum í fjølmiðlunum. Kristianna Sjóvará, sum er limur í búskapar- og løgfrøðingafelagnum, var saman við Marjuni Hanusardóttir nevnd í tíðindasending hjá útvarpinum hjá Kringvarpinum í gjár.

Høgni Hoydal, løgtingslimur, setir í sendingini spurnartekin við frágreiðingina hjá hesum báðum embætiskvinnum.

Sosialurin hevur tosað við Jóannu Djurhuus, sum er forkvinna í Búskapar- og Løgrfrøðingafelagnum, har Kristianna Sjóvará er limur.

- Tað er ongin loyna at embætisfólk, sum gera sína skyldu, skulu ikki hongjast út alment. Tí er tað ótrúliga óheppið, at embætisfólk vera sett fram alment. Vit hava ikki viðgjørt konkreta málið, men vit fara helst at viðgera málið prinsipielt á næsta fundi. Men vit eru í eini støðu við loyalitetskyldu og eru ov nær til at úttala okkum og ov langt burturi at hava ávirkan. Hetta er komi fyri fyrr, tá til dømis Oyvindur Brimnes varð lagdur undir at føra politikk, men vit hava ikki somu amboð sum onnur fakfeløg, og kunnu ikki gera so øgiliga nógv, sigur Jóanna Djurhuus, forkvinna í Búskapar- og Løgfrøðingafelagnum.

Ætlanin var at fáa orð á Marjuna Hanusardóttir, men hon var ikki tøk, tá Sosialurin royndi at fáa fatur á henni.